# ítróttur

Nr. 174 • mikudagur • 14. september 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Vilja hava trygd fyri trygdini

**Boðini frá Fótbóltsdómarafelagnum eru greið eftir rokið á Sevmýri millum TB og B36. Teir vilja hava trygdarreglurnar at virka til fulnar, áðrenn teir floyta dystir um vikuskiftið**

DÓMARAR
*Jákup Mørk*

Mánakvøldið hevði fótbóltsdómarafelagið fund, har hendingin á Tvøroyri serstakt stóð á skránni.

Tað, sum serliga hevði ans í hesum, var, hendingin eftir dystarlok, tá dómarin var á veg inn í skiftisrúmið. Her staðfesta reglurnar púrasta greitt, at ein trygdargeiri skal gerast, soleiðis at áskoðarar ikki kunnu koma nær dómaranum, men tað sluppu tey á Tvøroyri. Úrslitið varð, at dómarin varð bæði sligin og sparkaður, og tað er ikki nakað, sum dómararnir vilja finna seg í.



*Dagfinn Olsen, sum dømdi dystin á Sevmýri sunnudagin, er eisini formaður í Dómarafelagnum. Og har vilja tey hava greið boð um, at feløgini framyvir fara at halda seg til ásettu trygdarkrøvini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Trupulleikar eftir dystin

Trygdarreglurnar vórðu settar í gildi fyri nøkrum árum síðani, eftir at ein linjuverji varð sligin í búkin í hálvleiksssteðginum í einum dysti í Klaksvík. Ta ferðina var um reppið, at talan gjørdist um veruligt dómaraverkfall, tí dómararnir vildu ikki døma aftur, uttan at FSF hevði sett tiltøk í verk.

Síðani tá hava reglurnar verið til, men tað er tó langt ífrá altíð, at hesar verða hildnar. Í blaðnum í gjár staðfesti Dagfinn Olsen, formaður í Dómarafelagnum, at tað bara eru nøkur feløg, sum veruliga liva upp til krøvini.

Og ein annar trupulleiki tykist eisini at vera. Tað er nevnliga so, at dómararnir hava heimild til at nokta fyri at døma, um trygdin ikki er í lag. Men fleiri ferðir er tað so, at trygdarkrøvini verða fylgd undan dystinum - soleiðis at trygdarumboð er til staðar, tá dómarin kemur v.m. - og tí setir dómarin dystin í gongd. Men tá dysturin so er lokin, og dómarin skal fylgjast av vøllinum, er eingin at fylgja teimum út.

Sum skilst, so var tað eisini júst hetta, sum hendi á Tvøroyri um vikuskiftið.

Tað er millum annað hetta, sum dómararnir nú vilja hava í rættlag. Og tí er útmeldingin, at teir nú vilja hava trygd fyri trygdini, áðrenn farið verður undir dómaragerningin aftur.

# FSF stuðlar dómarunum

**Kappingarnevndin fer á fundi mikukvøldið at taka støðu til tað, sum gekk fyri seg í og eftir dystin millum TB og B36**

KÆRUVIÐGERÐ
*Jákup Mørk*

Hóast Kappingarnevndin hjá FSF enn ikki hevur viðgjørt dómarafrágreiðingina frá dystinum á Sevmýri um vikuskiftið, so var tað ein hampuliga avgjørdur formaður í nevndini, sum vit høvdu orðið á mánakvøldið.

- Vit fara at hava fund um málið mikukvøldið, so fyrr enn tá fáa vit ikki komið við nakrari niðurstøðu. Men tað skal so ikki vera nakar sum helst ivi um, at vit taka fult undir við dómarunum, tá teir siga, at trygdarkrøvini skulu eftirlíkast.

Soleiðis staðfestir Bjarki Mohr alt fyri eitt, tá spurt verður, um Kappingarnevndin hevur tikið støðu í málinum.

Hann vísir eisini á, at tað fleiri ferðir áður hava verið trupulleikar við trygdarkrøvunum.

- Vit hava javnan fingið frágreiðingar frá dómarum, sum siga krøvini ikki verða eftirlíkað. Og vit hava eisini givið nøkrum feløgum ábreiðslur fyri hetta. Tíverri sær tað tó út til, at hetta ikki hevur verið nóg mikið, tí ein hending sum tann á Tvøroyri, eigur ikki at koma fyri. Tað er tíbetur sjáldan, at stemningurin er so ógvusligur eftir ein dyst, men tá tað er soleiðis, so skulu júst trygdarkrøvini forða fyri, at nakað hendir í so máta, staðfestir hann.

### Reyða kortið til viðgerðar

Tá tosað verður um revsing fyri hendingina, vil Bjarki Mohr ikki siga nakað.

- Tað verður so eitt mál, sum vit fara at viðgera á fundinum. Men tað er einki at ivast í, at vit fara at nýta bæði dómarafrágreiðingina og sjónbandaupptøkur í okkara viðgerð, sigur hann.

Sambært kappingarreglunum um fótbólt, so eru fimm møguleikar fyri revsing, sum FSF kann gera nýtslu av. Hesir eru: At geva felagnum ávarin, at geva felagnum bót; at døma felagið at tapa dyst, at felagið verður dømt at missa heimavøll í ein ella fleiri dystir ella at felagið verður koyrt úr kappingini.

Umframt at gera av, hvørjar avleiðingar málið skal fáa fyri TB, so skal Kappingarnevndin eisini taka støðu til hendingarnar beint undan dystarloki. Tá fekk Jón Johannesen hjá TB reytt kort, sum kappingarnevndin skal taka støðu til. Men hartil verður støða helst eisini tikin til, hvørt teir tilburður, sum annars fóru fram kring reyða kortið, eisini skulu fáa avleiðingar.

## KÍ-VB hóskvøldið

VB skal á vinavitjan hjá íslendska Reyni um vikuskiftið, og hevur tí biðið um at flyta dystin í Klaksvík til hóskvøldið

Vágbignar høvdu á 100 ára degnum í vár vitjan av íslendska liðnum, sum nú heldur sín 70 ára føðingardag. Reynir er vinafelag hjá VB, og longu fríggjamorgunin fer VB til Íslands.

Dysturin í Klaksvík skuldi annars upprunaliga verið spældur í Vági. Men fyrr í ár játtaði KÍ at skifta um dyst, tí vágbingar fegnir vildu vera í Vági, tað vikuskiftið, sum jóansøkan varð spæld.

**-jm**

## Russiskur venjari vitjar

Havnar Fimleikafelag fær í næstum vitjan av russisku Polina Notchevnova, sum skal venja kappingarfimleikarar innan estetiskan fimleik

Hetta skrivar felagið á heimasíðu sínari. Sagt verður, at eftir at felagið saman við Ljósinum og Støkk tók lut á World Wide fimleikakappingini innan estetiskan fimleik, í Greve í maj 2005 var eingin ivi um, at hetta var leiðin felagið vildi fara framyvir.

Polina er kend innan estetiskan fimleik. Hon er 30 ára gomul og hevur síðan hon var smágenta íðkað rútmiskan fimleik í Russlandi.

Hon hevur verið við til at vunnið nógv meistaraheitir í Russlandi og er í dag dómari til tær altjóðu estetisku kappingarnar. Eisini hevur hon verið venjari innan rútmiska fimleikin i Russlandi.

Polina hevur verið við til at fáa tann estetiska fimleikin til Russlands og er í dag formaður í Russiska sambandinum í estetiskum fimleiki. Saman við Lilia Morozova hevur hon skrivað eina bók um grundvenjing innan estetiskan fimleik.

Polina fer at hava skeið í Føroyum í døgunum 12. sept. - 18. sept., har stórkappingar, rútmisku venjararnar og stórkappingarfimleikararnir hjá Havnar Fimleikafelag verða við til skeiðið.

Polina Notchevnova kemur til Føroyar við flogfari, mánadagin 12. sept. áleið kl. 9.40 føroyska tíð.

**-mørk**